# Bygdarráðsfundur - stytt gerðabók

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 31.05.2021 kl. 16.00

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Eir J. Norðberg |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| Ikki møtt: | Ronni Hammer |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við – hetta varð játtað og kemur á skrá sum mál nr. 14.

1. **Innkomin boð uppá jørð til at heysta 2021.**

   Innkomnu boðini eru:

   **Støðlarnar – matr. nr. 390f:**

   Erhard Eyvindsson: kr. 1.000,00

   Jón Thomsen: kr. 1.000,00

   **í Sondunum – matr. nr. 145a:**

   Ingi Mortensen: kr. 1.025,00

   **Avgerð:**

   Støðlarnar: Einmælt samtykt at leiga jørðina til Erhard Eyvindsson (lutakast).

   Í Sondunum: Einmælt samtykt at leiga jørðina til Ingi Mortensen.

2. **Val av umboði til felags eldraráð í Suðuroy.**

   Valið til eldraráð í Suðuroy, sum eftir ætlan skuldi vera í november 2020.

   **Avgerð:**

   Einmælt samtykt at velja Súsannu Niclasen til eldraráðið, sambært uppskoti frá Janus Thomsen.

3. **Skriv frá Búnaðarstovuni viðvíkjandi matr. nr. 85h, Hvalba.**

   Djóni Thomasen, adv. hevur vegna eigaran av matr. nr. 85h, sent skriv til Búnaðarstovuna viðvíkjandi gamlari áseting, sum biðið verður um at fáa strikaða.

   **Avgerð:**

   Einmælt samtykt at viðmæla, at servituttirnir verða strikaðir.

4. **Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 34c í Nesi.**

   Søkt verður um byggiloyvi til bilhús á Rókatrøð 14, Hvalba.

**Tekniska nevnd 26.05.2021:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá Jens Chr. Joensen, byggimálsviðgera.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 34c sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og BK17.

Janus Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 5.

5. **Umsókn um byggiloyvi til útbygning á matr. nr. 19l, Hvalba.**
Søkt verður um byggiloyvi til karnapp, umleið 2 x 5 m, ið verður bygdur í stovuhædd norðureftir á Sandavegi 4, Hvalba. Byggingin er framvið landsvegi og tí er umsóknin send Landsverk til ummælis. Landsverk gevur loyvi til byggingina, tá hetta er uttan fyri byggilinjuna á 15m.
**Tekniska nevnd 26.05.2021:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá Jens Chr. Joensen, byggimálsviðgera.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til útbygning á matr, nr. 19l sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og BK17.

6. **Skriv frá LV um yvirtøku av vegi í Sandvík – byggiloyvi matr. nr. 415b.**
Í sambandi við umsókn um byggiloyvi til at gera eitt hoyggjhús um til summarhús á matr. nr. 415b í Sandvík, eru nakrar forðingar í sambandi við landsveg inni í bygdini. Skriv frá Landsverk, har spurt verður um møguleikan, at Hvalbiar Kommuna yvirtekur henda partin av landsvegnum.
**Tekniska nevnd 26.05.2021:**
Nevndin er samd um at lata bygdarráðið taka støðu til málið.
**Vega- og havnanevnd 25.05.2021:**
Nevndin mælir til ikki at yvirtaka hetta vegastrekkið í Sandvík.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini, at kommunan ikki er sinnað at yvirtaka vegin inni í bygdini.

7. **Skriv frá borgara viðvíkjandi garði ímóti Bíarvegi.**
Gjørt verður vart við, at garður við sethúsaogn er skrædnaður.
**Vega- og havnanevnd 25.05.2021:**
Arbeiðsformaður og byggifrøðingur hjá kommununi hava verið á staðnum. Tilmælt verður, at ein stuðlamúrur verður stoyptur upp undir verandi dekk. Harumframt at rennan framvið múrinum verður asfalterað, so yvirflatuvatn ikki kemur beint niður við múrin. Viðvíkjandi innkoyring til húsini, hevur bygdarráðið samtykt, at kommunan ikki ger tún og innkoyringar fyri fólk, uttan at arbeiði er gjørt á staðnum.

<u>**Avgerð**</u>**:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og taka málið uppaftur, møguliga til fíggjarætlanina fyri 2022.

**8. <u>Skriv frá borgara um ymisk viðurskifti</u>.**
Skriv um ymiskt:
1. Vegastrekkið Nes og heim á Tangan
2. Ferðsluforðingar í Nesi
3. Fríøkini og planting
4. Skúlin í Nesi
**Trivnaðarnevndin 10.03.2021:**
Nevndin arbeiðir miðvíst við at gera tillaðingar á fríøkjunum í sóknini og forkvinnan hevur verið í sambandi við Skógrøkt landsins um harðfør trø og runnar. Eisini eru leykir settir í blómukassar. Skótaliðið hevur brúkt skúlan í Nesi í nøkur ár. Um ynski er um at brúka skúlan til okkurt tiltak, kann hetta gerast við at seta seg í samband við forkvinnuna í Trivnaðarnevndini, Eir J. Norðberg.
**Vega- og havnanevndin 25.05.2021:**
Nevndin hevur gjørt eitt uppskot til svarskriv viðvíkjandi vegastrekkinum Nes og heim á Tangan og um ferðsluforðingar í Nesi.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt at svara sambært niðurstøðunum hjá Trivnaðarnevnd og Vega- og havnanevnd.

**9. <u>Skriv viðvíkjandi innkoyring til hús</u>.**
Gjørt verður vart við, at høgur kantur er framvið innkoyringini til húsini.
**Vega- og havnanevnd 25.05.2021:**
Nevndin mælir til, at arbeiðsformaðurin fer á staðið og fær hetta gjørt.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

**10. <u>Innkomið tilboð uppá vatnleiðing</u>.**
Biðið er um tilboð uppá brandpostar, rør, fittings, slangur og tilfar til Sandvíkar.
**Fíggjarnevndin 31.05.2021:**

| | |
|---|---|
| Tangavirkið: | kr. 96.137,22 u/MVG (frítt lev.  Sandvík) |
| Bærendsen Teknik: | kr. 79.180,00 u/MVG |

Samtykt varð einmælt at taka støðu á bygdarráðsfundinum, tá tilboð uppá alt komið inn.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Tangavirkinum kr. 96.137,22 u/MVG, grundað á, at tilboðið frá Bærendsen Teknik ikki var útgreinað.

**11. <u>Innkomin tilboð uppá at skifta vindeygu á kommunuskrivstovuni</u>.**
Fimm fyritøkur eru bodnar at koma við tilboði uppá at skifta vindeyguni á kommunuskrivstovuni,

Jákup Norðberg, S.H.-Bygg, Tommy Olsen, Ørvur Norðberg og Jan J. Poulsen.
Tvey tilboð eru innkomin:

| | |
|---|---|
| Tommy Olsen: | kr. 89.695,00 v/MVG (arbeiðsløn og tilfar) |
| S.H.-Bygg: | kr. 89.723,60 u/MVG (arbeiðsløn og tilfar) |

**Fíggjarnevndin 31.05.2021:**
Samtykt varð einmælt at taka støðu á bygdarráðsfundinum, tá vónandi fleiri tilboð eru innkomin.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Tommy Olsen kr. 89.695,00 v/MVG.

**12. Innkomið tilboð frá Wired Relations – skipan GDPR.**
Í sambandi við nýggju Dátuverndarlógina frá 1. januar 2021, eru krøvini viðvíkjandi persónsupplýsingum herd. Wired Relations PRO bjóða fram skipan til skráseting av, hvørjir persónsupplýsingar eru í okkara skipanum – árligur kostnaður kr. 17.988,00.
**Fíggjarnevndin 31.05.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av hesum tilboði.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

**13. Góðkenning av roknskapi fyri 2020.**
Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2020 til góðkenningar. Inntøkurnar frá kommuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 34.121, rakstrarútreiðslur tkr. 27.631, rentustuðul og rentuútreiðslur tkr. 350 og løguútreiðslur tkr. 8.964.

| | **Rakstur:** | **Løgur:** |
|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. 2.226 | tkr. 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. 10.518 | tkr. 0 |
| §3. Børn og ung | tkr. 5.701 | tkr. 330 |
| §4. Undirvísing | tkr. 2.393 | tkr. 425 |
| §5. Mentan og frítíð | tkr. 1.400 | tkr. 8 |
| §6. Teknisk mál | tkr. 2.757 | tkr. 589 |
| §7. Kommunal virki | tkr. 2.636 | tkr. 7.612 |
| | **tkr. 27.631** | **tkr. 8.964** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 8.302. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 8.614 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362, nettokostnaður til eldrasamstarv er sostatt tkr. 8.252.
**Fíggjarnevndin 31.05.2021:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið roknskapin og mælir bygdarráðnum til at góðkenna roknskapin.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at góðkenna roknskapin fyri 2020.

**14. <u>Skriv frá Eydnu Danielsen</u>**

Skriv viðvíkjandi víðkaðum samstarvi við Tvøroyrar skúla. Talan er um nakrar lærugreinir, ið Hvalbiar skúli ikki hevur møguleika at bjóða. Peningurin verður funnin innanfyri játtanina hjá skúlanum.

**Trivnaðarnevndin 27. mai 2021:**

Nevndin skal kanna prís uppá koyringina, áðrenn støða kann takast.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at játta hesum.

**15. <u>Ikki almenn mál.</u>**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.    Fundur lokin kl. 19.30

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Eir J. Norðberg | Niels Olaf Eyvindsson |
| Gunnhild Mortensen | Thorstein Thomsen | Martin í Nesi |